# Løgdu oljubyrgingar á Kaldbaksfirði

Hósdagin vandi norska standbybáturin Strill á Kaldbaksfirði

TRYGD
*Eyðun Klakstein*

Fyrrapartin hósdagin vóru oljubyrgingar lagdar á Kaldsbaksfirði.

Orsøkin til hetta var ikki nakar veruligur leki, men ein venjing hjá standbybátinum Strill Safety, sum nú skal á føroyska feltið at halda vakt fyri Amerada Hess.

Pauli Einarson stóð fyri skeiðnum á Kaldbaksfirði, og hann letur væl at.

– Manningin umborð vandi at leggja oljubyrgingar út og at taka tær inn aftur, og tað gekk væl. Vit tosaðu eisini um, hvussu oljudálking kann fyribyrgjast og hvussu byrgingarnar skulu virka, sigur hann.

Pauli Einarson hevur gjørt líknandi venjing umborð á øðrum vaktarskipi, og fyrr í vikuni var eisini venjing við teirri trygdarútgerðini, sum skal liggja á landi í Suðuroy.



*Hósdagin hevði vaktarskipið Strill Safety venjing á KaldbaksfirðiHósdagin hevði vaktarskipið Strill Safety venjing á Kaldbaksfirði*




# Laaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær. Bæði til gaman og álvara. Unna tær eina fríløtu frá gerandisdegnum við einum longum vikuskifti í Aberdeen, har tú tekur tær av løttum. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað nú so væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Stuttleika tær í stuttleikaparkini Cadona´s ella slappa av í the Leisure Centre. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu fráliku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum. Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 09.00 ella kl 19.00.

Ferðaavgjald sum er kr. 474,- kemur afturat prísinum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355


# Hægri barnafrádrátt



**Klaksvík:** Í uppskotinum um fíggjarætlan fyri komandi ár ætlar Klaksvíkar kommuna at hækka barnafrádráttin.

Barnfrádrátturin, sum í ár er 3000 krónur, skal hækka upp í 3500 krónur. Hendan hækkin fer at kosta Klaksvíkar kommunu eina lítla millión.

Skattaprosentið í Klaksvík skal verða tað sama, sum tað hevur verið, 20%.

# Tøkk

Øllum tykkum, sum við gávum, telegrammum, uppringingum og tykkum, ið vóru við til 75 ára føðingardagin 12. september, sum varð hildin 15. september í hølum Gøtu Menningarfelags, takki eg hjartaliga.

**Ludvík Strømsten,**
**Norðragøta**